# Ómøgulig tjalding

**Danski blaðið B.T. gevur føroysku tjaldingarstøðunum av grovfíluni, men náttúran og føroyski maturin verða róst upp um skýggja**

TJALDING
*Heri á Rógvi*



Mynd:
*Tjaldingarplássið í Havn er ikki nakað gott tjaldingarstað, heldur danski blaðið B.T. Men náttúran er so vøkur, at tað loysir seg allíkavæl at koma til Føroya at tjalda*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Herfyri var danska blaðið B.T. á vitjan í Føroyum. Talan var um ein "campingtúr",t.e. tjalding hjá Anne-Vibeke Isaksen, sum skrivar tjaldingarfrásagnir fyri kenda morgunblaðið.

Greinin verður rópt fyri "Den umulige campingtur". Anne-Vibeke Larsen og myndamaður eru farin til Føroya við teirri tesu, at sagt verður, at tað ómøguligt at tjalda í Føroyum – í øllum førum við campingvogni.

Og við tí fyri eyga, at prógva ella mótprógv hesari tesu, verður farið til Føroya við opnum sinni.

Alt byrjar eisini við. Donsk blaðfólk – og kanska danir sum heild – leggja oftani bragdliga fyri, tá tað snýr seg um náttúrulýsingar í Føroyum. Í so máta er Anne-Vibeke Isaksen heldur einki undantak.

"Solen skinner fra en dybblå himmel, og vandet er havblik. Bedre velkomst kan man vel næppe forvente, og vi nyder hvert et sekund, vel vidende at det kan ændre sig til tæt tåge på meget kort tid", skrivar Anne-Vibeke Isaksen.

Myndin er ikki heilt ljósareyð, men tað verður hon meira, tá prátið fer at snúgva seg um føroysku náttúruna.

B.T. fer ein túr við Palla undir Vestmannabjørgini, og hetta fær eisini – væl skilligt – nøkur jalig lýsingarorð frá donsku blaðkvinnuni.

Men sjálvt uppihaldið á tjaldingarstaðnum í Havn er ikki nøkur stór uppliving samanborið við onnur støð uttanlands, heldur Anne-Vibeke. Tað er kortini frálíkt umhvørvið tætt at náttúruni, men umstøðurnar eru vánaligar. Staðið minnir mest um eitt parkeringspláss, skrivar Anne-Vibeke Isaksen.

Men náttúruupplivilsi tykist at doyva alt annað.

»På Færøerne er alt tæt på naturen, så det bliver automatisk en naturlig, men også prisværdig del af ferien.«

Aðrastaðni í greinini frætta vit, at hóast tann føroyski maturin kanska ikki ljóðar at vera so góður, so smakkar hann frálíkt, og danska blaðkvinnan mælir øllum til at royna.

Somuleiðis verður tað hildið vera heilt framúr at síggja seyðir ganga/klatra í brøttum lendi. Sig so ikki tað.

## Einki og alt

B.T. gevur vanliga stjørnur til ymiskt, og camping er einki undantak. Givið verður stjørnur í fimm ymsum bólkum. Tað mesta eru seks stjørnur, og tað minsta er eingin. Í heili tveimum førum fær Torshavn Camping botnkarakter – onga stjørnu. Tað er í sambandi innkeypsmøguleikar og mat á tjaldingarplássinum, at tann fyrsti botnkarakterurin verður latin. Har er einki at fáa á staðnum, men einar tíggju minuttir burtur eru handlar og caféir, verður sagt.

Í sambandi við aðrar umstøður, eitt nú svimjimøguleikar og tílíkt, verður somuleiðis eingin stjørna givin til Torshavn Camping.

«Der er absolut intet på pladsen», ljóða hørðu orðini.

Viðvíkjandi toiletviðurskiftum og øðrum verður ein av seks stjørnum latin; náttúran gevur tríggjar útav seks stjørnum í sambandi við umhvørvi. Men í tí í síðsta bólkinum verða seks av seks stjørnum latnar fyri náttúruupplivingar, og hon vildi fegin givið eina afturat, verður sagt.

Og niðurstøðan er so:

»Camping på Færøerne kan være svært – men det er hele besværet værd. Ikke mindst er naturoplevelserne i særklasse«.

Eitt gott ummæli fyri nakrar serstakliga vánaligar karakterir. Og fyri tað heilt eitt sindur lættari, verður ein mynd av tjaldingarstaðnum á Eiði prentað við greinini í B.T.


wwwejen til oplevelserne
Hytte i sommerferien
Spørg om camping i B.T.
Den umulige campingtur
Torshavn Camping

*Danska blaðið B.T. hevði fyrr í mánaðinum eina frásøgn um tjalding í Føroyum*

# Sovnaði umborð

**Einsamalli maðurin við Bjarnafossi sovnaði umborð, og eftirlýsingin varð send út, men maðurin kom aftur í øllum góðum**

SJÓFERÐSLA
*Eirikur Lindenskov/*
*Heri á Rógvi*

Um hálvgum elluvutíðina leygarmorgunin fekk Sjóbjargingarstøðin boð um, at báturin »Bjarnafossur« KG 140, ið var farin av Havnini kl 05 leygarmorgunin á veg til Svínoyar, ikki var komin vegin fram. Fólk vóru tí blivin bangin um bátin og mannin, ið var einsamallur í bátinum. Sera tjúkt í toku var á leiðini.

Tórshavn radio sendi eina lýsing út yvir VHF-in, har heitt bleiv á skip og bátar at hyggja eftir "Bjarnafossi".

Løgreglan í Runavík fór at leita fram við landi á Eysturoynni, og løgreglan í Klaksvík fór at leita fram við landi á Borðoynni.

Brimil, ið var á leiðini, fór eisini at leita,eisini fór bátur úr Svínoy at leita.

Ein eftirlýsing eftir bátinum bleiv send í útvarpinum kl. 1220. Og stutt eftir hetta komu boð úr Árnafirði, at ein bátur, ið líktist "Bjarnafossi", var sæddur á fjørðinum um middagsleitið.

Kl. 13:57 leygardagin fann Brimil bátin millum Lisshøvda og Heltnina á Svínoynni.

Báturin lá og sigldi í ring. Tað vísti seg, at maðurin var sovnaður.

Brimil tók bátin og mannin umborð og sigldi á Havnina.



# Sálarsjúka rullar um landið

**Í september fer ein bussur at koyra til ávísar skúlar í landinum og kunna um sálarsjúkur. Næmingarnir fáa innlit í, hvat tað vil siga at vera sálarliga sjúkur og kunnleika til, hvat tað merkir fyri eitt barn at hava sálarliga sjúk foreldur.**

KUNNING
*Ingi Rasmussen*

Nógv børn og vaksin hava ilt við at tosa um sálarsjúkur. Vitanin er avmarkað og fordómarnir nógvir. Tað fer ein heldur øðrvísi bussleið at bøta um í døgunum frá 1. til 17. september.

Kunningarbussurin er ein 20 metrar langur treylari, sum »PsykiatriFonden« í Danmark eigur. Bussurin hevur við góðari unditøku vitjað ymsastaðni í Danmark og er ein týdningarmikil liður í arbeiðnum hjá »PsykiatriFondens Børneprojekt«. Endamálið við verkætlanini er stutt og greitt at økja um vitanina um sálarligar trupulleikar og sjúkur og at bróta niður ótta og ótryggleika, sum framvegis eru knýtt at evninum.

Hesum hugskoti hevur felagið Føroyskir psykiatriskir sjúkrarøktarfrøðingar, FPS, tikið til sín og hevur tikið stig til, at bussurin rullar kring Føroyar í næstum.

– Í fyrstu syftu fer bussurin til miðnámsskúlarnar í landinum, og úrvaldar skúlar við framhaldsdeild, tí tíðin er so avmarkað. Valt er út á tann hátt, at bussurin kemur kring alt landið, men eydnast tiltakið væl, so er hugsandi, at tað verður endurtikið seinni. Vit vóna eisini, at vit læra nakað av tiltakinum, so vit kunnu taka ymisk hugskot til okkara at brúka, sigur Oddbjørg Johansen, forkvinna í FPS.

Talan er um rullandi undirvísingarhøli, bóksavn og eina framsýning, sum er vend ímóti bæði lærarum og næmingum í fólkaskúlum og miðnámsskúlum. Pláss er fyri 30 næmingum í senn og møguleiki er fyri, at næmingarnir vitja bussin í flokkum. Við bussinum eru trý starvsfólk, sum bæði hava royndir við psykiatri og undirvísing. Tey standa fyri at vegleiða og undirvísa. Video og teldur eru grundarlagið undir undirvísingini saman við faldarum, bókum og øðrum tilfari.

Næmingarnir fáa innlit í, hvat tað vil siga at vera sálarliga sjúkur og kunnleika til, hvat tað merkir fyri eitt barn at hava sálarliga sjúk foreldur.

Undirvísingin er skipað á tann hátt, at fakligt tilfar verður sent flokkunum frammanundan, og tað verður gingið ígjøgnum saman við læraranum. Næsta stigið er sjálv undirvísingin, sum fer fram í bussinum og triðja stig er, at flokkarnir saman við lærarunum taka samanum.

Bussurin er eisini eitt opið tilboð til tann einkulta næmingin, læraran ella foreldrið um eina samrøðu í sambandi við persónligar ella prinsipiellar sálarligar trupulleikar.



*Nógv fólk fjala sínar sálarligu trupulleikar, tí nógv skomm er knýtt at hesum sjúkum, sigur Oddbjørg Johansen, sjúkrarøktarfrøðingur, ið skipar fyri einari kunningarherferð um sálarsjúkur*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Tey niðurbróta tabu og fordómar

**Endamálið er at niðurbróta tabu, at fáa fólk at koma fram við síni sjúku og at stuðla børnum, sum er hart rakt, tá foreldur gerast sálarsjúk, sigur Oddbjørg Johansen, sjúkrarøktarfrøðingurin, ið fyriskipar einari kunningarherferð um sálarsjúkur**

SÁLARSJÚKA
*Ingi Rasmussen*

– Vit, sum arbeiða á psykiatriska økinum, síggja, at tað í almenninginum er alt ov lítil vitan um psykiatri. Tað er sera harmiligt, tí hagtøl vísa, at fjórði hvør av okkum fyrr ella seinni hevur tørv á psykiatriskari hjálp.

Soleiðis sigur Oddbjørg Johansen, forkvinna í FPS, ið er felagið fyri føroyskar psykiatriskar sjúkrarøktarfrøðingar. Felagið skipar fyri kunningarherferðini, sum seinni í ár fer at rulla kring landið.

Tabu er størsti trupulleikin hjá sálarsjúkum. Við tabu fylgja fordómar, og við fordómum fylgir skommin. Hetta ger umstøðurnar hjá sálarsjúkum nógv verri, enn tær annars kundu verið. Tað er ein sannroynd, at nógv sálarsjúk detta burturímillum, tí vit hava so ilt við at tosa um sjúkuna.

– Vegna vantandi vitan og fórdómar um psykiatri eru nógv fólk, sum fjala sínar sálarligu trupulleikar, tí nógv skomm er knýtt at hesum sjúkum. Eg kann nevna, at millum 20 og 30 prosent av teimum, sum fáa depressjónir, ongantíð koma í viðgerð. Við skjótari viðgerð kundi tíðarskeiðið, depressjónin varar, verið stytt munandi, sigur Oddbjørg Johansen.

Endamálið við kunningarherferðini er at knúsa tabu. Kunningarbussurin fer til støð, har ungfólk halda til. Koyrt verður til miðnámsskúlarnar í Føroyum og ávísar útvaldar framhaldsskúlar, og endamálið er at raka tey ungu. At fáa tey opnari og at lata upp.

Tað er serliga í teimum ungu árunum, at sálarsjúkan vísir seg, og nógv børn og ung hava eisini stórar trupulleikar av, at foreldur teirra eru sjúk.

– Børnini eru altíð taparar. Foreldur, sum gerast sjúk, fáa viðgerð, men børnini standa eftir við stórum trupulleikum, sum ongin tekur sær av. Hesi børnini plágast av skomm, skuldarkenslu og ikki minst einsemi, tí tað verður tagt burtur, sigur Oddbjørg Johansen, sum kundi hugsað sær eitt fast tilboð til børn.

Tað vísir seg eisini, at skúlarnir ikki hava nakran hátt at takkla, at ein næmingur gerst sjúkur. Tá næmingurin kemur aftur í skúla er oftast bert tøgn. Vistu næmingarnir betur, hevði tað verið lættari at komið aftur til gerandislívið hjá tí, sum er vorðin sjúkur.

– Eitt stig á leiðini er upplýsing um sálarsjúkur, og vit trúgva, at upplýsingarherferðin kann vera við til at bróta fordómar, so hesi børn og ungu, vit venda okkum til, fáa eina størri fatan av sálarsjúkum og eisini tora at koma fram við sínum trupulleikum, um tey sjálv vera rakt, sigur Oddbjørg Johansen.

# Varðhaldsfongsling longd í fýra vikur

**Danin, sum varð tikin í at smugla 20 kilo av hassji til Føroya, skal sita fýra vikur afturat í varðhaldi, áðrenn málið er klárt at koyra fyri rættin. Tað hevur Føroya rættur gjørt av**

RÚSEVNI
*Ingi Ramussen*

– Vit gera framvegis kanningar her í Føroyum og uttanlands, er einasta viðmerkingin, sum Georg Otthamar, kanningarleiðari á kriminaldeildini, í løtuni hevur til tað stóra hassjmálið.

Mánadagin varð varðhaldsfongslingin longd í fýra vikur hjá manninum, sum fyri góðum mánaði síðan varð tikin á veg í land av Norrönu við 20 kilo av hassji í viðførinum. 28 ára gamli danin sat avbyrgdur fyrstu tvær vikurnar og síðan tvær vikur í varðhaldi, men tað hevur ikki verið nóg mikið hjá løgregluni, og tí gav Føroya rættur fyri afturlæstum hurðum fýra vikur afturat til kanningararbeiðið.

Talan er um størstu nøgdina av hassji, sum nakrantíð er funnin á veg í land í Føroyum. Einki er at ivast í, at fleiri standa aftanfyri. Løgreglan vil einki siga um, hvussu langt kanningarnar eru komnar, men tað skilst á lagnum, at arbeitt verður bæði við at finna føroyska og útlendska sambandið.

Maðurin var eyðkendur, tá hann kom í land av Norrönu mánamorgunin 23. juni. Ein, ið eygað verður hildið við. Tá hann so gjørdist sjónliga fjáltraður av at síggja hundin hjá tollvaldinum, tóku teir hann til síðis, og í taskuni, sum hann hevði um herðarnar, lá hassjið. Søluvirði: 2,5 milliónir krónur.